# Altjóða bindidagur í **Stikkuni**

**Leygardagin 13. juni er altjóða bindidagur, og hetta verður hildið í tógvhandlinum Stikkuni í J.C Svabosgøtu í Havn**

## HANDIL

Stikkan er Føroya størsti tógvhandil, og altjóða bindidagin, ið er nú leygardagin 13. juni, verður nógv gjørt burturúr í Stikkuni

Tey bjóða viðskiftafólki vælkomnum inn á gólvið at fáa góð hugskot, viðskiftafólk fáa óivað nógv góð gullkorn frá fyrikomandi starvsfólkunum, og eisini er workshop á skránni.

Kaffi og tea er at fáa, og opið er frá klokkan 11:00 til 14:00 leygardagin.

Hea vikuna hevur Stikkan eisini góð tilboð og Ístex tógv (Lopi) er hesa vikuna niðursett við 20%.

### Besta úrval

Stikkan er Føroya størsti tógvhandil og hevur besta úrval í landinum. Starvsfólkini veita dygga vegleiðing og nógv modell eru at síggja.

### Stikkan

Stikkan hevur Unique og Chunky í leysari vekt, har ein sjálvur kann vinda sær tógv.

Stikkan umboðar Falkenberg og Vivian Høxbro, eisini selja tey Ístex, Sandnes, Drops, Isager, Mora vevitógv, Snældu tógv og nógv annað. Eisini er hópur av uppskriftum til taks. Bindimaskinur av merkinum Silver Reed verða seldar, frá tí føroyska umboðnum, Katrin Haraldsen, K.FO og byrjunarundirvísing fer fram í handlinum.

Eisini selur Stikkan alt tilhoyr, ið hoyrir slíkum handli til.

Stikkan hevur, umframt at vera størsti handil av sínum slag í landinum, eisini eina væl útbygda og sera viðkomandi og upplýsandi heimasíðu, ið er verd at vitja hjá teimum, ið fáast við at binda.

Heimasíðan er www.stikkan.fo

Í Stikkuni sleppa fólk í koyristóli innar uttan trupulleikar, og spælipláss er til børnini.

Opið er gerandisdagar frá klokkan 11:00 til 17:30 og leygardag frá 11:00 til 14:00. Eisini er opið eftir nærri avtalu, og sent verður kring alt landið.

Meðan Summarkappingin hjá Sosialinum fer fram, hevur Stikkan tilboð hvørja viku.



















